Námsferð við Norrønu til Íslands

8. - 11. apríl 2025

Týsdagur 8. apríl 2025

Vit fara ikki í skúla, men møta á Farstøðini í seinasta lagi kl. 11.00. Eftir ætlan leggur Norrøna frá landi kl. 13.00. Landgongin verður tikin kl. 12.00

Vit kekka inn, beint áðrenn vit fara umborð.

Passini og tryggingarkortini, ið tit longu hava klistrað í passini, skulu handast Róa, tá vit eru komin umborð. Tey, ið hava tørv á sjóverkstablettum, geva Rana tær at umsita. Sigið eisini frá, um tað er annar heilivágur, ið næmingarnir taka.

Umborð á Norrønu sova vit í 4-mans kømurum. Matur á morgni, middegi og nátturða er íroknað tað, tit hava goldið.

Skráin fyri dagarnar er hendan:

Týsdagur 8. apríl 2025

Kl. 13.00: Fráferð

Kl. 14.00: Svimjihylur, sauna og fitness hava opið

Kl. 17.00: Hitapottarnir hava opið

Kl. 17.30: Matstovurnar hava opið

Kl. 20.00: Live-tónleikur í Undirhúsinum

Mikudagur 9. apríl 2025:

Kl. 07.00: Morgunmatur í Skansagarði

Kl. 07.00: Svimjihylur, sauna og fitness hava opið

Kl. 9.00: Vit koma til Íslands

Norrøna leggur at í Seyðisfirði kl. 9.00.

Kl. 07.30 eta vit morgunmat saman á Skansagarði. Takið svimjiklæði, handklæði, ryggsekk og annað, ið tit hava tørv á við.

Vit fylgjast í land og fara í buss okkara. Vit koyra til Dimmuborgir, Námaskarð og Mývatn. Her hugna vit okkum, hyggja at íslendska landslagnum og svimja í heitum undirgrundsvatni. Frá Seyðisfirði tekur tað uml. 2,5 tímar at koyra til Mývatn.

Út á seinnapartin koyra vit aftur til Seyðisfjarðar og eta nátturða saman umborð á Norrønu. Eftir nátturðan er fríløta.

Hósdagur 10. apríl 2025

Vit møtast til morgunmat kl. 7.30

Kl. 9.00 fara vit í land og koyra til Vøk Baths/Sundlaug ella annað, ið liggur tætt við Egilsstaðir (vit kanna nøkur ynski, ið næmingarnir høvdu). Tað tekur uml. 45 min. at koyra frá Seyðisfirði til vøk. Her hugna vit okkum nakrar tímar. Á veg heimaftur steðga vit á Egilsstøðum at keypa.

Vit vera aftur á Norrønu kl. 18.00.

Kl. 20.00 leggur hon frá landi.

Fríggjadagur 11. apríl 2025

Vit sova nakað longri, men í seinasta lagi kl. 9.00 skulu vit eta morgunmat. Vit hava fríløtu fram til kl. 16.00, tá Norrøna leggur at í Tórshavn.

GG!. Broytingar kunnu verða í skránni fyri tøki og veður.

At minnast til:

Á ferðini umboða vit Føroyar, Skúlan við Løgmannabreyt, okkum sjálvi og foreldur okkara. Latið okkum umboða hesi væl!

Vit eru umborð á Norrønu saman við nógvum øðrum ferðandi úr nógvum londum. Vit kunnu tí ikki tuska og spæla, sum vit vilja. Vit muga vísa virðing fyri øllum við góðum atburði.

Í seinasta lagi kl. 00.00 eru øll í sínum kamari. Summi vilja sova - og tað skulu tey sleppa.

Hetta skulu tit hava við:

Pass, tryggingarkort og lummapengar við skili.

G.G. Allur matur umborð, matpakkar til útferðir og felagstiltøk, so sum Mývatn og svimjing er goldið. Tit avgera sjálvi, um lummapeningur er í reiðum peningi ella á korti.

Toiletlutir.

Hóskandi klæðir til útferðir og svimjing.

Lítlan ryggsekk til útferðirnar.

Kort- og borðspøl.

Tað er loyvið at hava fartelefon við, men tað er sera umráðandi, at vit eru "saman á túrinum." Meta vit lærarar, at telefonin fer við ov nógvari tíð, savna vit telefonirnar inn.